# LEIKSKRÁ

22. UMFAR

28. SEPTEMBER 2020

BLAÐ NR. 11



MYND: ÁLVUR HARALDSEN

VÆLKOMIN TIL
DYST Í FLØTUGERÐI

HAVSBRÚN

betri DEILDIN

# Innihald

Dysturin í dag ..... 4
Hagtøl fyri Betri-deildina hjá monnum ..... 8
Liðuppsetingin hjá ÍF og EB/Streymi ..... 10
Leikarin hesaferð ..... 14
Hagtøl fyri Betri-deildina hjá kvinnum ..... 18
Undanfarnu umfør ..... 22
ÍF-sangurin ..... 26

**ÍF**, Ítróttarfelag Fuglafjarðar, 530 Fuglafjørður, tel. 228771, if@if.fo, www.if.fo.
**Útgevari:** ÍF-fótbóltur. **Ábyrgd:** ÍF-fótbóltur. **Uppsetan:** Maibritt P. Bærentsen.

MAGN KAFFI
NÝMALIÐ • VISTFRØÐILIGT



HAVSBRÚN
P/F Havsbrún • P.O. Boks 81 • 530 Fuglafjørður • tel. 41 44 00 • fax 41 44 01
havsbrun@havsbrun.fo • www.havsbrun.fi



TEKST: EIVIN BREIÐASKARÐ

# Dysturin í dag

Í dag standa okkara dreingir á ÍF-liðnum yvirfyri einum mótstandara, sum vit taptu 0-1 ímóti fyri stuttari tíð síðani. Tað eru 4 vikur síðani, at ÍF-liðið kom aftur frá Margáum við einum keðiligum tapi ímóti EB/Streymur. Innsatsurin sum bleiv lagdur fyri dagin tann dagin varð als ikki nøktandi, og tí er eitt krav frá okkum fjepparum, at tað blívur til ein heimasigur.

Tað hevur ofta verið nokkso javnt, tá ið hesi bæði liðini hava møtst á leikvøllinum síðstu mongu árini. EB/Streymur og ÍF vórðu topp-lið fyri 8-9 árum síðani, og møttust eisini í finaluni í Løgmannsteypinum í 2001 og 2011. Báðar ferðirnar vann blá/svarta liðið úr Sundalagnum steypið.

Síðani tá eru hesi bæði liðini blivin partur av niðaru hálvu av Betri-deildini, umframt at tey eisini bæði hava verið niðri í 1.deild ein túr. EB/Streymur í 2016 og ÍF í 2018.

Tað er ongin loyna, at tað ikki hevur gingið serliga væl hjá ÍF mongu síðstu umførini. Tað er bert blivið til 2 stig síðstu 8 umførini. Ein 2-2 javnleikur á Argjum 27.juli og so 4-4 á Skála nú síðsta mikukvøld. Ætlar man at sleppa upp í topp-5, so krevur tað, at úrslitini verða meira jøvn og at fleiri sigrar koma í hús.

Toppskjúttin í Betri-deildini, Uros Stojanov hjá ÍF, er odnaður aftur, og óiva verður hann ein hóttan ímóti verjuni hjá EB/Streymur í dag. Stuttligt, um Uros kundi fingið mál aftur í dag, og staðfest sína støðu sum toppskjútti í føroyskum fótbólti.

Koyrið á dreingir og latið ongan iva verða um, at í Fløtugerði er to torført at verða útilið, og ÍF á heimavølli altíð spælur upp til sítt besta og ætlar sær sigurin hvørja ferð.

**Góðan dyst.**











SPEKT
løggildir grannskoðarar

Tórshavn
Staravegur 17
Tel. 34 34 34

Klaksvík
Stangaskákið 1
Tel. 34 34 35

spekt@spekt.fo
www.spekt.fo




Brekkutún 4 | 188 Hoyvík | Tel. +298 30 88 00 | torshavn@samskip.com | www.samskip.fo



TÍTT FLUTNINGSFELAG

samskip




Fønix

Mykinesgøta 8 · Boks 18 · FO-110 Tórshavn · Tel 31 19 09

22. UMFAR

# HAGTØL

## í Betri-deildini hjá monnum

KELDA: FAROESOCCER

### 22. UMFAR

| |
|---|
| ÍF - EB/Streymur |
| KÍ - AB |
| NSÍ - Skála |
| TB - Víkingur |
| B36 - HB |

### 23. UMFAR

| |
|---|
| TB - ÍF |
| Víkingur - KÍ |
| AB - NSÍ |
| EB/Streymur - B36 |
| HB - Skála |

### Betri-deildin Menn

betri DEILDIN

| NR | LIÐ | D | V | J | T | VM | TM | MM | S |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | HB | 20 | 17 | 1 | 2 | 62 | 17 | 45 | 52 |
| 2 | KÍ | 20 | 15 | 3 | 2 | 58 | 18 | 40 | 48 |
| 3 | NSÍ | 20 | 14 | 2 | 4 | 39 | 15 | 24 | 44 |
| 4 | B36 | 18 | 13 | 1 | 4 | 54 | 24 | 30 | 40 |
| 5 | Víkingur | 20 | 12 | 2 | 6 | 41 | 29 | 12 | 38 |
| 6 | ÍF | 20 | 6 | 3 | 11 | 26 | 44 | -18 | 21 |
| 7 | EB/Streymur | 21 | 6 | 1 | 14 | 18 | 49 | -31 | 19 |
| 8 | TB | 21 | 3 | 5 | 13 | 14 | 28 | -14 | 14 |
| 9 | AB | 20 | 0 | 7 | 13 | 12 | 58 | -46 | 7 |
| 10 | Skála | 20 | 0 | 3 | 17 | 14 | 56 | -42 | 3 |

TOPP 10

### MÁLSKJÚTTAR í Betri-deildini

| NR | NAVN | MÁL |
|---|---|---|
| 1 | Uros **Stojanov** (ÍF) | 14 |
| 2 | Jóannes **Bjartalíð** (KÍ) | 13 |
| 3 | Finnur **Justinussen** (Víkingur) | 12 |
| 4 | Klæmint A. **Olsen** (NSÍ) | 10 |
| 5 | Meinhard E. **Olsen** (B36) | 10 |
| 6 | Mikkel **Dahl** (HB) | 10 |
| 7 | Petur **Knudsen** (NSÍ) | 10 |
| 8 | Adrian **Justinussen** (HB) | 10 |
| 9 | Michal **Przybylski** (B36) | 10 |
| 10 | Páll **A. Klettskarð** (KÍ) | 8 |

### UPPLEGG í Betri-deildini

| NR | NAVN | MÁL |
|---|---|---|
| 1 | Daniel **Johansen** (HB) | 12 |
| 2 | Jóannes **Bjartalíð** (KÍ) | 11 |
| 3 | Patrik **Johannesen** (KÍ) | 11 |
| 4 | Sølvi **Vatnhamar** (Víkingur) | 11 |
| 5 | Jann **Benjaminsen** (NSÍ) | 9 |
| 6 | Meinhard E. **Olsen** (B36) | 9 |
| 7 | Árni **Frederiksberg** (B36) | 8 |
| 8 | Ole Erik **Midtskogen** (KÍ) | 7 |
| 9 | Petur **Knudsen** (NSÍ) | 7 |
| 10 | Philip **Djordjevic** (ÍF) | 6 |

# 22. UMFAR

betri DEILDIN

## ÍF

| Leikari | Nr. |
|---|---|
| Tóri T. **Traðará** (M) | 1 |
| Jan Ó. **Ellingsgaard** (L) | 3 |
| Jens **Joensen** | 4 |
| Karl **Løkin** | 6 |
| Dánjal **á Lakjuni** | 7 |
| Uros **Stojanov** | 8 |
| Filip **Djordjevic** | 9 |
| Ari Ó. **Ellingsgaard** | 10 |
| Hákun **Edmundsson** | 11 |
| Hans Jákup **Lervig** | 12 |
| Jákup **N. Olsen** (M) | 13 |
| Gundur E. **Petersen** | 14 |
| Bogi A. **Løkin** | 15 |
| Sámal **Joensen** | 17 |
| Pól Jákup **Lundsbjerg** | 18 |
| Rói **Róin** | 19 |
| Jóhan **Petersen** | 20 |
| Tóri **N. Olsen** | 21 |
| Sjúrður Pauli **Nielsen** | 22 |
| Andy Ó. **Olsen** | 23 |
| Milos **Budakovic** (M) | 25 |
| Ólavur **Larsen** | VENJARI |
| Hans Jørgen **Djurhuus** | VENJARI |
| Pauli **Jarnskor** | MÁLMANSVENJ. |
| Milan **Svojic** | HJÁLPARVENJ. |

FYSIO: HANUS ELIASEN, ÁLVUR HANSEN OG JÓNFRÍÐ HANSEN
LIÐLEIÐARAR: TRÚGVI NESÁ, ÓLAVUR ELLINGSGAARD, POUL N. MIKKELSEN OG PALLI VANG

## EB/STREYMUR

| Nr. | Leikari |
|---|---|
| 1 | Rói **Zachariasen** (M) |
| 2 | Símun **Sólheim** |
| 3 | Árni **G. Olsen** |
| 4 | Gestur **B. Dam** |
| 5 | Mikkjal **Hellisá** |
| 6 | Hjalti **K. Djurhuus** |
| 7 | Magnus **Jarnskor** |
| 8 | Rói **H. Olsen** |
| 9 | Tóki **Johannesen** |
| 10 | Jónstein **Magnussen** |
| 11 | Niklas **Kruse** |
| 12 | Jóanes **Ey. Davidsen** (M) |
| 13 | Ragnar **B. Danielsen** |
| 14 | Magnus **Heinason** |
| 16 | Albert **T. Nielsen** |
| 17 | Petur **Zachariasen** |
| 19 | Bjarki **L. Zachariasen** |
| 20 | Poul **G. Olsen** |
| 22 | Arnbjørn T. **Hansen** |
| 24 | Fannhard **A. Skoradal** |
| 25 | Gutti **Dahl-Olsen** |
| 26 | Andras **Ó. Olsen** (L) |
| 27 | Høgni **Hummeland** |
| 28 | Bárður **Olsen** |
| VENJARI | Jákup Martin **Joensen** |
| HJÁLPARVENJ. | Arnar **Dam** |
| HJÁLPARVENJ. | Arnbjørn **T. Hansen** |

LIÐLEIÐARAR: ÓLAVUR H. EJDESGAARD, ESMAR EIÐISGARÐ, ALFRED JACOBSEN OG EYÐFINNUR JOENSEN

BÓLTSTUÐUL: NÝRÚM

| | | |
|---|---|---|
| DÓMARI | Rúni **Gaardbo** | |
| HJÁLPARDÓMARAR | 1. Jan **Andersen** | 2. Johnleif **Gerðisá** |
| 4. DÓMARI | Aron Sofus **Vest** | |
| EYGLEIÐARI | Niklas **á Líðarenda** | |











Green Marine Divers
Tlf.: +298 77 00 60



LEIKARIN

# 13 JACOBA LANGGAARD

**TEKST:** ATLI PETERSEN. **MYND:** JÓGVAN ÓLI KRISTIANSEN

## TÚ:

**Navn:** Jacoba Langgaard
**Føðingardagur:** 24.09.88
**Føðistað:** Tórshavn
**Starv:** Eftirlitsfólk á matvørudeildini hjá Heilsufrøðiligu starvsstovuni
**Pláss á vøllinum:** Spæli sum oftast á miðuni
**Yvirtrúgv:** Skítfult
**3 orð sum lýsa teg:** Illsint, snarsint, bráðlynt 😛
**Torførasti mótstøðumaður:** Ansy og Heidi Sevdal
**Frítíðarítriv:** Matur og urtapottar
**Vónir fyri 2020:** Um eg havi lív og heilsu (og knø), so er tað at vinna heiðursmerki í fótbólti og at allarbesti Regin trívist

## TÍN ÍTRÓTT:

**Fyrsti dystur á 1.liðið:** 2005
**Nær spældi tú fyrstu ferð fyri ÍF:** 2013
**Aðrar ítróttargreinar:** Hondbóltur nøkur ár síðan og tað er nokk eisini ein sportur at øsa seg
**Minningarríkasti dystur:** Tapið fyri Noreg síðsta summar
**Størstu fótbóltsliga ávirkan:** Øll tey góðu fólkini, sum hava verið virkin í fótbólti hjá kvinnum (hjá LÍF, NsSÍ, GÍ, ÍF, Víkingi)
**Besti fótbóltsleikari:** Hann var nokk ikki tann besti, men havi altíð dámt Michael Carrick
**Um ikki fótbólt, hvørja ítróttargrein hevði tú so valt:** Hevði nokk verið ein góður fimleikari 😉
**Hvat slag av venjing dámar tær best:** Vanligt interval
**Hvat slag av venjing dámar tær ikki:** Uttan bólt og ov nógvir reglar
**Um ikki fótbólt, hvørja ítróttargrein hevði tú so valt:** Hondbólt
**Hvat slag av venjing dámar tær best:** Tekniska
**Hvat slag av venjing dámar tær ikki:** Renning

## TÍNIR FAVORITTAR:

**Matur og drekka:** Raspað flak frá mammu og pepsi max
**Slag av tónleiki:** Alt frá Beyonce til Eivør
**Sjónvarpssending:** Westworld
**At slappa av:** Eta
**Troyggja nr.:** Nú er tað nr. 13
**Besti fótbóltsleikari nakrantíð:** Zidane
**Sjónvarp/filmstjørna:** Anthony Hopkins
**Besta bók/blað:** Factfulness
**Stuttligasti persónur:** Petur beiggi mín
**Stuttligasti í hópinum:** Tað eru fleiri, men má velja Maritu, tá hon er í essinum
**Besti ÍF áskoðari:** Sigrid, Marta og Maria




## FAKTA UM JACOBU

Hevur leikt 132 dystir, skorað 37 mál og hevur fingið 12 gul kort í bestu deildini.

Er ein av teimu royndastu leikarunum, sum vit hava á A-landsliðinum.

Fyrst í Juli var Jacoba við í einari Facebook kapping, har møguleiki var at vinna eitt karton av Pepsi Max Blueberry. Tíverri fyri hana, so vann hon ikki.




Allar vanligar umvælingar
Dekksøla
Viðlíkahald

**Bilverkstaðið á Kambsdali**
**Tlf. 441111**

A Member of The Linde Group

# AGA-FØROYAR



AGA - Føroyar/www.AGA.fo/Akranesgøta 2/FO-100 Tórshavn/Tlf + 298 - 315544/AGA@AGA.fo

KELDA: FAROESOCCER

## Betri-deildin Kvinnur

| NR | LIÐ | D | V | J | T | VM | TM | MM | S |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | KÍ | 16 | 15 | 1 | 0 | 46 | 14 | 32 | 46 |
| 2 | NSÍ | 14 | 4 | 6 | 4 | 26 | 23 | 3 | 18 |
| 3 | HB | 15 | 4 | 5 | 6 | 28 | 24 | 4 | 17 |
| 4 | ÍVB | 14 | 4 | 4 | 6 | 18 | 23 | -5 | 16 |
| 5 | B36 | 14 | 3 | 5 | 6 | 17 | 22 | -5 | 14 |
| 6 | EBS/Skála | 15 | 3 | 1 | 11 | 10 | 39 | -29 | 10 |

**HETTA UMFAR (ÚTS.)**
27. september 2020

**ÍVB - B36**
HB - KÍ
EBS/Skála - NSÍ

**KOMANDI UMFAR**
30. september 2020

**B36 - ÍVB**
NSÍ - EBS/Skála
KÍ - HB

### TOPP 10
### MÁLSKJÚTTAR í Betri-deildini

| NR | NAVN | MÁL |
|---|---|---|
| 1 | Evy **á Lakjuni** (KÍ) | 13 |
| 2 | Heidi **Sevdal** (NSÍ) | 9 |
| 3 | Jacoba **Langgaard** (ÍVB) | 6 |
| 4 | Olga Kristina **Hansen** (B36) | 6 |
| 5 | Rannvá **Andreasen** (KÍ) | 6 |
| 6 | Julia Naomi **Mortensen** (HB) | 5 |
| 7 | Ása **Carlsen** (HB) | 4 |
| 8 | Elin Maria **Isaksen** (HB) | 4 |
| 9 | Eyðvør **Klakstein** (KÍ) | 4 |
| 10 | Jensa **Tórolvsdóttir** (B36) | 4 |

### TOPP 10
### UPPLEGG í Betri-deildini

| NR | NAVN | MÁL |
|---|---|---|
| 1 | Evy **á Lakjuni** (KÍ) | 8 |
| 2 | Durita **Hummeland** (KÍ) | 7 |
| 3 | Elin Maria **Isaksen** (HB) | 6 |
| 4 | Julia Naomi **Mortensen** (HB) | 6 |
| 5 | Sara **Lamhauge** (HB) | 6 |
| 6 | Heidi **Sevdal** (NSÍ) | 5 |
| 7 | Jensa **Tórolvsdóttir** (ÍVB) | 5 |
| 8 | Rannvá **Andreasen** (KÍ) | 4 |
| 9 | Sanna **Svarvadal** (KÍ) | 4 |
| 10 | Emma **Hansdóttir** (B36) | 3 |








**Leiðandi reiðarí**
í norðurhøvum




VARÐIN
P/F Varðin | Garðabrekka 4 | FO-510 Gøtu | Tel 610600
vardin@vardin.fo | www.vardin.fo

**Vit takka fyri stuðulin**

multiputl
Vit sveisa vinyl, gera HVS arbeiði
og putlast við alt møguligt annað …
tel. +298 207575 | multiputl@multiputl.fo



**TEKST:** EIVIN BREIÐASKARÐ.
**MYND:** ÁLVUR HARALDSEN

# UNDANFARNU UMFØR

**Tað er nakað síðani, at vit hava havt heimavøll í Betri-deildini. Síðstu heimadystur varð ímóti Víkingur 23. august, tá ið vit taptu 1-2.**

Síðani tá hava okkara leikarar spælt 3 útidystir. Fyrst varð tað ein dystur við Margáir, sum vit taptu 0-1. Hetta varð ein illa leiktur dystur, har ÍF ikki vildi so nógv frameftir vøllinum, og har spælið stóran part av tíðini hekk illa saman. Ein keðiligur dystur fyri okkum sum hugdu hetta sein summarkvøldi í Sundalagnum.

Aftaná fylgdi so ein sera torførur dystur á Tórsvølli ímóti oddaliðnum HB. Mótstøðan varð sera stór í hesum dystinum, og tað varð eisini HB sum vann dystin. Tó varð hetta ein dystur, har ÍF aftur vísti nakað av tí spælinum og viljanum, sum liðið hevur víst fyrr í kappingini, tá ið teir vunnu nakrar dystir á rað. Uros fekk bæði málini í hesum dystinum. Faktiskt tvær perlur.

Á Skála hevur mangan verið sera torført fyri ÍF at fáa úrslit, men í fyrsta umfarinum í ár, sum varð leikt 9.mai, vunnu okkara leikarar 1-2 í einum dysti, har Uros fekk bæði málini. Nú síðsta mikukvøld vitjaðu vit aftur á Skála, og vónirnar til dystin vóru eisini góðar. Tað bleiv til ein málríkan dyst, sum endaði 4-4. ÍF varð á odda 2-0 eftir 23 minuttum, og tað varð onki sum bendi á, at tað ikki fór at blíva til 3 stig hetta regnváta kvøldi á Skála. Tó so, so kom Skála-liðið upp á 2-2 í fyrra hálvleiki, og aftaná 58 minuttir legði heimaliðið seg á odda 3-2. ÍF mentist so aftur og javnaðu fyrst til 3-3 eftir 65 minuttum, og legði seg so á odda 4-3 eftir 67 min við máli frá Uros. Tað sá leingi út til, at 4-3 skuldi verða úrslitið av hesum dystinum, men Skála vildi tað øðrvísi og javnaði til 4-4, tá ið 94 minuttir vóru leiktir.

Ein málríkur dystur, har tað tíverri aftur varð sjón fyri søgn til, at ÍF hevur torført at halda mótstandarunum vekk frá at skora, og at tað ikki er lætt at fáa fulla úrtøku, um mótstøðuliðini sleppa at leggja trýst á ÍF-verjuna við at leggja bóltar inn um aftastur verjuleikararnar.

Dagsins maður á Skála varð Filip Djordjevic, sum skoraði 3 mál. Áðrenn hendan dystin hevði hann bert skora 1 mál í Betri-Deildini í ár. Uros legði seg einsamallan á odda á toppskjúttaralistanum við hansara máli til 4-3. Uros er nú komin uppá 14 mál fyri 19 dystir. Tað gevur eitt miðal skoringsprosent uppá 0,74 mál í hvørjum dysti. Tað má sigast at verða bara heilt góðkent. Vit hava sóknast eftir einum nattúrligum málskorara síðstu árini. Tað hava vit so sanniliga fingið í Uros.



Dagsins maður á Skála varð Filip Djordjevic, sum skoraði 3 mál

BMT
Byggimestarin Thomsen

Tel 580044
Alt kann gerast

RVtøkni

·Góðkendur Elinnleggjari
·PLC Menning
·SCADA Menning
·Serútgerðsveitari
·Signal Viðgerð
·Vinnulig Elinnlegging

Stangavegur 14 | Postnr. 700 | Klaksvík |Tlf: 230 230 | T-Post: rv@rvt.fo |www.rvt.fo

Vit takka fyri stuðulin



MOWI

FAROE ISLANDS
RINKA
FINEST SALMON
CRAFTED BY NATURE



**FULLKOMILEIKIN HEVUR EITT NAVN.** Hon eitur Rinka.
Hon er sterk. Sjáldsama vøkur. Rinka veksur seg til í Føroyum og verður myndað av brimi og kyrru. Tað er hetta, sum ger hana til heimsins besta laks.
Handfarin við nærlagni. Handfarin av náttúruni.

Hetta er Rinka. Laksur úr Føroyum frá Mowi.

RINKA.FO

# „Vit eru ÍF-fan“

## SYNGIÐ VIÐ

Í Fuglafirði mangan dystin leika
Í reyðum, hvítum klæðum eru tit
Á vølli allir leikarar nú reika
Og vinna dystin – ja, tað vilja vit.

**Vit eru ÍF-fan**
**Vit vita hvat ein kann**
**Vit eru best, og vinna hvat sum helst**
**Vit hava sett sum mál, at vinna hvørja sál**
**Nú Fuglafjørður hevur nátt sítt mál.**

Í deildini vit skulu verða bestir
Og vinna alt ið vinnast kann í dag
Jú, ÍF-leikarar teir eru treystir
Og fólkini tey gerast øll so glað.

**Vit eru ÍF-fan ...**

Á vøllinum vit skulu standa saman
Um tað nú ikki gongur sum tað skal
Á bakkanum í álvara og gaman
Og vóna at tað gondur okkum væl.

**Vit eru ÍF-fan ...**

Vit armarnar í lofti nú upp hevja
Og kunnu ikki standa her í frið
Tá sjálvandi vit gullið kunnu tevja
Nú eiga vit jú Føroya besta lið.

**Vit eru ÍF-fan ...**

TAKKAR FYRI STUÐULIN